## Ætlaðu gassálop á amerikanska sendistovu

Handtøkur í Italia benda á, at yvirgangsmenn høvdu lagt ætlanir um at leypa á eina amerikanska sendistovu við cyanid-gassi.

Tað er tað viðurkenda bretska blaðið Sunday Times, sum ber tíðindini.

Sambært blaðnum hava italsku myndugleikarnir avdúkað, at yvirgangsmenn ætlaðu at smugla cyanid til Evropa. Gassið skuldi flytast í kassum, sum sambært pappírunum vóru fullir av tomatum.

Ein av teimum handtiknu skal hava greitt italsku løgregluni frá, at hann hevði verið til venjingar, har hann hevði fingið at vita, hvussu hann og felagar hansara skuldu bera seg at, og at ætlanin m. a. var at lata gassið í luftskiftiskipanina í stórum bygningum.

Cyanid-gassið var ósjónligt, men kundi beina fyri fleiri hundrað fólkum eftir bara tíggju minuttum.

### Hjálp úr Iran

Amerikanska fíggjarmálaráðið vil vera við, at Islamic Culture Institute í italska býnum Milano er tann týdningarmesta evropeiska støðin hjá al-Qaeda. Teir menninir, sum eru tiknir í Evropa, verða allir settir í samband við hendan stovnin, og avhoyringar hava eisini avdúkað, at ein av monnunum, tunesarin Ben Kjemais, hevði samband við sjálvmorðsflogskiparan Mohamad Atta.

Italska løgreglan tók herfyri nakrar menn í einari íbúð í Milano. Ein av monnunum skal hava greitt løgregluni frá, hvussu hann og hinir bóru seg at við at sleppa í venjingarlegurnar hjá bin Laden í Afghanistan.

– Á iransku sendistovuni í London bar til at fáa innferðarloyvi til Saudiarabia, tí vit skuldu til Mekka. Í Iran er ein felagsskapur, sum hjálpir mujaheddinbrøðrum um markið til Afghanistan, skal maðurin hava greitt frá.

Tað hevur ljóðað, at yvirgangsmenn høvdu ætlanir um at søkja at onkrari amerikanskari sendistovu í Evropa, og avhoyringarnar í Milano hava sambært Sunday Times avdúkað, at talan var um amerikansku sendistovuna í Rom.

*(Fartekst)*

# Japan biðið koreanar um umbering

Umberingin fer kanska at bøta um viðurskiftini millum Japan og koreansku londini.

Tað var japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi, sum í gjár bað fólkið í teimum báðum koreansku londunum um umbering fyri ta líðing, teimum var fyri undir japanska hersetingarvaldinum í árunum frá 1910 til 1945.

– Eg biði inniliga um umbering fyri ta sorg og ta pínu, sum Japan veitti koreanska fólkinum undir hjálandatíðini, segði Koizumi á Sodaemunsavninum í Seoul.

Í hersetingartíðini nýtti japanski herurin savnið sum fongsul, og nógv fólk í koreansku frælsisfylkingini vórðu illa pínd og eisini avrættað í fongslinum. Fleiri hundrað fólk gingu eisini mótmælisgongu uttan fyri Sodeamun-savnið, tá



japanski forsætisráðharrin vitjaði tað.

Viðurskiftini millum Japan og tey bæði koreansku londini hava verið ógvuliga spent seinastu árini, tí Japan hevur sýtt fyri at biðja um umbering fyri harðskapin undir hersetingini. Tað hevur ikki gjørt støðuna betur, at japansku myndugleikarnir hava góðtikið, at skúlarnir nýta søgubøkur, sum fullkomiliga reingja tann søguliga veruleikan undir hersetingini.

Spurningurin er nú, um umberingin hjá Koizumi, forsætisráðharra fer at bøta um støðuna.

# Dømd til deyða fyri fólkamorð

Fýra fólk afturat eru nú dømd til deyða fyri fólkamorðið í afrikanska landinum Rwanda.

Tey fýra vórðu øll funnin sek í álopum har suðuri í landinum undir tí tríggjar mánaðar langa blóðbaðnum í 1994, segði rwandiska útvarpið í gjár.

Átta onnur vórðu dømd lívlanga fongsulsrevsing, trý fingu sjey ára fongsul, og tvey vórðu fríkend.

Krígsbrotsmannadómstólurin í Rwanda fór til verka tíðliga í ár, og longu teir fyrstu seks mánaðarnar vórðu 73 fólk dømd til deyða.

Síðani árslok í 1996 hava millum 5000 og 6000 fólk verið fyri rættinum í Rwanda, men enn er langt á mál, tí ikki færri enn 120.000 eru tikin og skuldsett fyri at hava verið uppií, tá umleið 800.000 tutsiar og hóvligir hutuar vórðu fyribeindir eftir trimum mánaðum.

ST hevur medvirkað til at fáa tey seku dømd.


"Tað trupulasta í lívinum, er at vita, hvørja brúgv ein skal fara yvirum, og hvørja brúgv ein skal brenna"

David Russel



**Løgfrøðingur til Føroya Tele**

Samskiftið við onnur vaksur dag um dag, og fjarskifti er vorðið eitt lyklaorð í einum framkomnum samfelag. Á Føroya Tele taka vit við gleði ímóti teimum avbjóðingum, sum av hesum standa, og fyri at standa so væl búgvin sum til ber, mugu leiðsla og starvsfólk kunna fáa góða vegleiðing.

Føroya Tele stendur fyri at víðka um løgfrøðiliga stápin. Arbeiðsuppgávur, sum liggja fyri framman eru sera fjølbroyttar, men liggja tó mest innanfyri almennan vinnulívsrætt, m.a. innan fjarskifti, kapping og KT.

Hvønn dag stinga nógvir innanhýsis og uttanhýsis løgfrøðiligir spurningar seg upp, sum krevja skjóta og góða viðgerð. At arbeiða saman við verandi løgfrøðingi okkara, søkja vit til eftir einum løgfrøðingi afturat.

**Tað er ein fyrimunur um tú hevur:**
- arbeiðsroyndir úr líknandi starvi
- góðan førleika í føroyskum, donskum og enskum í skrivt og talu
- samráðingarroyndir
- edv- førleika á brúkarastøði
- góð samstarvsevni, umframt førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Føroya Tele kann bjóða eitt starv í einum mennandi umhvørvi við**
- fakligari og persónligari menning
- endurútbúgvingar- og skeiðmøguleikum
- góðum arbeiðsumhvørvi
- møguleika at leggja arbeiðstíðirnar til rættis eftir persónligum tørvi

Løn og setanarviðurskifti verða sambært avtalu. Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jens Wang, løgfrøðing, á beinleiðis tel 303377 ella til Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skal vera Føroya Tele í hendi í seinsta lagi fríggjadagin 19. oktobur 2001 og skal sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Sum Føroya størsta fjarskiftisfyritøka hevur Føroya Tele ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Nettosølan var í 2000 kr. 242 mió. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið.**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




# Tjóvur viðgekk seg sekan

**Leygarnáttina varð løgreglan í Runavík aftur tilkallað eftir innbrot, hesuferð í Keypssamtøkuni í Saltangará. Gerningsmaðurin er tikin, og hann hevur viðgingið seg sekan í hesum innbrotinum umframt innbrotinum í Litaval seinasta vikuskiftið**

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin klokkan fýra hevði ein maður brotið seg inn í Keypssamtøkuna í Saltangará. Alarmurin fór í gongd, men maðurin skræddi alarmin niður, so hann slóknaði. Alarmurin boðaði tó frá í Havn, og haðani varð ringt til eigararnar av Keypssamtøkuni.

Teir fóru beinanvegin av húsum og sóu innbrotstjóvin inni í handlinum. Teir tordu tó ikki at fara inn, tí gerningsmaðurin bað teir sleppa sær burtur, og hann hevði ein hamara í hondini.

Síðani varð løgreglan í Runavík tilkallað, men tá hon kom á staðið, hevði maðurin tikið til rýmingar. Eigarin kundi tó lýsa útsjónd mansins, og hon minti nógv um lýsingina av tjóvinum, sum hevði brotið inn í Litaval vikuna frammanundan.

Løgreglan í Runavík sigur, at hon hevði havt henda mannin í kikaranum, og hann varð funnin og tikin sunnukvøldið.

Maðurin, sum er 29 ára gamal, hevði brotið ein rút í garasjuhurðini og slapp soleiðis inni í goymsluna. Hann hevði tikið vekslipengingin úr kassanum, sum var 950 krónur. Harumframt hevði hann pakkað sær tveir stórar skrelliposar við tubbaksvørum. Hesar hevði hann tó ikki fingið við sær.

Løgreglan upplýsir, at maðurin var ávirkaður, tá innbrotið varð framt, og at hann hevði verið inni í handlinum í einar fjøruti minuttir.

Tá maðurin varð avhoyrdur, viðgekk hann seg sekan í tveimum innbrotum. Í seinastu viku tók hann nevniliga 10.000 krónur úr kassanum í Litaval í Runavík.

Hann er síðani leyslatin, men hann skuldi aftur til nærri avhoyringar mánadagin.

# Misnýtarar leitaðu eftir heilivági

**Fríggjanáttina leitaðu tveir misnýtarar, sum eru kendir hjá løgregluni, eftir heilivági. Hetta førdi til innbrot umborð á línubátinum Ægir, og teir vóru eisini á landssjúkrahúsinum, har teir leitaðu eftir rúsandi evnum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina klokkan hálvgum fýra fekk løgreglan ta fyrstu fráboðanina um teir báðar misnýtararnar, sum leitaðu eftir heilivági í Havn.

Ein maður kom framvið línu- og snellubátinum, og hann sá, at heilivágskassin lá dekkinum. Hann boðaði løgregluni frá, og hon fann tveir mans við lummunum fullum av heilivági. Hesir vórðu tiknir á støðina til avhoyringar, men vórðu leyslatnir beinanvegin.

Teir høvdu brotið ein rút niður í lugarið, har teir høvdu tikið ymiskt úr heilivágskassanum. Harumframt høvdu teir tikið neyðrakettir og neyðbluss, sum teir tó høvdu tveitt frá sær, áðrenn løgreglan fann teir. Hundurin hjá løgregluni tevjaði seg tó skjótt fram til rakettirnar og blussini.

Eisini høvdu menninir verið í stýrhúsinum og leitað, men har var einki at finna.

### Fóru á landssjúkrahúsið

Tá teir báðir menninir, sum vóru 41 og 30 ára gamlir, sluppu av støðini, hildu teir beina leið út á landssjúkrahúsið. Har fóru teir upp á deild 8, sum er intensiv deild. Á deildini høvdu teir leitað í øllum skápunum og í rullikassunum, sum verða nýttir til at trilla heilivágin runt á stovurnar til sjúklingarnar.

Teir høvdu tó ikki tikið nakað á landssjúkrahúsinum uttan ein frakka hjá einum av starvsfólkunum. Hetta vóru somu menn, sum høvdu verið umborð á Ægir.

Løgreglan metir hetta sera álvarsamt, tí sjúklingarnir, ið liggja á deild 8, eru sera viðbreknir, og teir eiga altíð at liggja trygt.

# Kall og Tele F endaliga samanløgd í november

**Kall og Tele F, sum í summar avgjørdu at leggja saman, eru nú av álvara farin at rigga til, soleiðis at klárt kann vera at leggja saman um miðjan november**

SAMANLEGGING
*Heri á Rógvi*

Við eitt fekk Føroya Tele kapping. Áðrenn nakar visti av, so vóru tvær nýggjar fyritøkur á marknaðinum, sum báðar bjóðaðu fjarskiftistænastur. Kall og Tele F itu og eita fyritøkurnar. Í summar kom tað fram, at Kall og Tele F skuldu leggja saman til eina fyritøku, ið skuldi eita... Kall.

Tað, sum fer at henda er, at tað mestir verður Kall, sum meira ella minni keypir ella leggur minni fyritøkuna Tele F undir seg. Fyritøkurnar báðar søgdu longu beinanvegin, at tað fór at vera torført hjá hesum báðum nýggju fyritøkunum at yvirliva á føroyska marknaðinum saman við Føroya Tele. Í framtíðini, ella í nærmastu framtíð í øllum førum, verður tað so ein fyritøka, sum kemur at kappast við almenna partafelagið á fjarskiftisøkinum.



*Kall og Tele F fara eftir ætlan endaliga undir at leggja fyritøkurnar saman um miðjan november.*

### Kundar fluttir yvir

Tað er sjálvandi eitt sindur av hvørjum, sum skal fáast upp á pláss áðrenn hesar báðar góðu fyritøkur kunnu leggjast saman. Fyrireikingarnar til at leggja saman hava verið ígongd nú eina tíð. Sambært stjórunum báðum, so verður miðjað ímóti at leggja fyritøkurnar saman um miðjan næsta mánað, tá endaligu aðalfundirnir skulu vera.

Kundarnir hjá Tele F skulu eftir ætlan flytast yvir til nýggju Kall fyritøkuna. Kundarnir hjá Tele F fara at fáa tilboð um m.a. Internet frá nýggju fyritøkuni. Enn er ikki heilt avgjørt hvørjar prísir nýggja fyritøkan fer at kunna bjóða sínum gomlu og nýggju viðskiftafólki.

Tað verður væntandi Framtaksgrunnur Føroya, sum kemur at vera størsti partaeigarin í nýggju fyritøkuni. Hinir partaeigarnir vera: Kaupthing, Tallaton Holding, Teletænastan og Islandssimi.

Sambært stjórunum, so krevur alt hetta við samanleggingini nógva fyrireiking, tí tað eru eitt nú ein rúgvu av nýggjum kundum, sum skulu fáast inn í skipanina hjá Kall.

### Vinarkall

Seinasta átakið hjá Kall er ein tænasta, sum teir hava valt at kalla vinarkall. Henda tænastan er lík tænastum, sum vit kenna uttanlands. Sambært stjóranum hjá Kalli, Bjarna Askham Bjarnason, so henda nýggja tænastan verið ávegis í longri tíð. Fyri kortum fingu teir neyðuga loyvi frá Fjarskiftiseftirlitinum, soleiðis at klárt var at fara ígongd. Sambært stjóranum, so hava teir fingið nógvar nýggjar kundar.

Eisini hjá Tele F leggjast fleiri kundar afturat. Felagið ger ikki tað nógva við at marknaðarføra seg longur, men Billy Hansen, stjóri, sigur, at teir framvegis fáa nýggjar kundar.

# 27 fyritøkur tvingsilsavtiknar

**Fríggjadagin sendi Skráseting Føroya skiftirættinum áheitan um tvingsilsavtøku av 27 feløgum**

SKRÁSETING
*Heri á Rógvi*

1. august var dagurin, tá Skráseting Føroya eftir røttum átti at havt móttikið allar roknskapir frá føroyskum parta- og smápartafeløgum fyri 2000. Nú, hálvantriðja mánað seinni, vanta enn omanfyri tjúgu roknskapir. Hjá nøkrum feløgum stendur so illa til, at Skrásetingin hevur biðji um eina tvingsilsavtøku.

Talan er 27 parta- og smápartafeløg, sum ikki hava latið roknskapin fyri ár 2000 inn. Hjá hesum vendist neyvan aftur, og føroyska samfelagið kann byrja at venja seg við tankan um at vera 27 feløg minni. Tað er við heimild í partafelagslógini, at Skráseting Føroya hevur tveitt hesar fyritøkur í Skiftirættin.

Kristin Balle, Skráseting Føroya, sigur við Sosialin, at tey enn vanta omanfyri tjúgu roknskapir fyri 2000. Hetta er tó rættiliga lítið sammett við árini frammanundan. Tað eru ymsar orsøkir til, at hesi feløg ikki hava latið roknskap sín inn. Tey flestu av hesum feløgum hava ásett eitt dag, har tey skulu latið roknskapin inn. Kristin Balle sigur, at ongar áheitanir verða sendar út afturat.